Sosialurin
Nr. 167 - 3. september 2009

## Berlusconi hóttir

Italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, vil hava trígggjar milliónir evrur ella 22 milliónir krónur í endurgjaldi fyri blaðnum l'Unita. Harafturat krevur hann, at blaðstjórin og tríggir blaðmenn á blaðnum skulu rinda 200.000 evrur í bót hvør ella 7,5 milliónir krónur tilsamans. Orsøkin er, at forsætisráðharrin kennir seg ærumeiddan í fleiri greinum í l'Urita. Men tað er ikki bara hetta blaðið, sum hevur fingið øði í Berlusconi. Sagt verður, at hann ætlar sær eisini at stevna italska blaðnum La Republica og nøkrum bløðum í Bretlandi, Fraklandi og Spania.



## Fleiri flóttafólk til ES

ES-nevndin arbeiðir nú við einari ætlan, sum skal gera tað lættari hjá flóttafólki at sleppa at fáa uppihaldsloyvi í samveldinum. Nevndin vísir í hesum viðfangi á, at í fjør fingu umleið 6.000 flóttafólk uppihaldsloyvi í teimum 27 ES-londunum. Til sammetingar tók USA ímóti meiri enn 60.000. Sambært BBC fer nevndin at leggja dent á, at flóttafólk úr Irak skulu fáa uppihaldsloyvi í samveldinum. Í hesum sambandi vísir nevndin á, at umleið tvær milliónir irakar eru flýddir av landinum og liva í útlegd, tey flestu í Sýrialandi og Jordan.

# Kvett grundað á sam

**Hóast hvørgin parturin vil vátta tíðindini, so eru tað eftir øllum at døma samstarvstrupulleikar, ið gera, at fýra bygdarráðslimir í brævi heita á Páll á Reynatúgvu at leggja frá sær sum borgarstjóra á Sandi**



*Brandur Sandoy, bygdarráðslimur, vil ikki siga, um hann stuðlar borgarstjóranum ella ikki og annars vil hann lata tøgnina tala*



*Fríði Nolsøe, bygdarráðslimur, vil onki siga um brævið, sum er sent borgarstjóranum*



*Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri, heldur a*

KOMMUNUPOLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Stór órógv hevur verið á Sandi, síðan tað kom fram, at fýra av sjey bygdaráðslimum hava sent bræv til Páll á Reynatúgvu, borgarstjóra, har teir heita á hann at leggja borgarstjórasessin frá sær. Líka til nú, hevur tað ikki verið frammi, hvat stendur í brævinum.

Tað er nevniliga soleiðis, at heimasandsfólk bara hava vitað, at nú er tað eina ferð enn stríð í kommununi hjá teimum.

Miðlarnir hava verið eftir bæði borgarstjóra og brævsendarum at fáa eina frágreiðing, men tøgn hevur verið einasta ljóðið.

Hetta hevur givið borgarunum í kommununi ein trupulleika. Fá vita nevniliga, hvør stýrir í kommununi, hvør orsøkin er til ætlaða kvettið ella hví hetta ætlaða kvett kemur beint nú.

- Hetta byrjar veruliga at blíva óbehagiligt, sigur eitt av bygdarfólkunum.

Og tað er júst soleiðis stemningurin í bygdini er. Øll vilja hava at vita hvør ræður, men fáur vanligur borgari veit. So fáur, at sjálvt onnur av frisørunum í bygdini, ikki dugir at siga, hvat fyriferst. Hinvegin eru fleiri, sum vilja gita ymiskt, og tað er líka frá gølum til vanligt politiskt valdspæl.

Eisini halda fólk í bygdini tað vera sera óheppið, at stríðið skal halda fram í bygdarráðnum, tá kommunan hevur nógvar avbjóðingar, sum Sandoyartunnil, ítróttarhøll og eisini kommunusamanlegging.

### Brævsendarar tiga

Tá teir, sum hava sent brævið til Páll á Reynatúgvu, verða spurdir, hvat stendur í brævinum, siga teir seg minnast illa, men at brævið ikki er nøkur verulig bumba. Afturat tí vilja teir helst ikki tosa um málið og meta, at Páll á Reynatúgvu eigur næsta leik.

- Tað er Páll á Reynatúgvu, sum hevur bóltin, og nú bíða vit eftir, hvussu hann verður spældur víðari, sigur Fríði Nolsøe, ið er ein av teimum fýra, sum hava skrivað undir áheitanina á Páll á Reynatúgvu at leggja frá sær.

Hinir, ið hava skrivað undir, eru Poul D. Klementsen, Eyðvarur Petersen og Brandur Sandoy. Felags fyri teir allar er, at teir allir valdu Páll á Reynatúgvu til borgarstjóra. Tó var bert Brandur Sandoy á sama valevnislista, sum Páll á Reynatúgvu.

Hóast teir fýra ikki vilja greiða frá, hvat stendur í brævinum, so siga teir seg ikki vera bangnar fyri upplýsingunum í brævinum.

- Tit skulu bara fara til Páll. Hann hevur í hvussu so er móttikið brævið og nú er tað hansara. Og fyri okkum skal hann vera meira enn vælkomin at almannakunngera tað, siga teir.

Allir halda tó fast við, at tað ikki hevði teirra áhuga, at málið endaði í miðlunum. Og tí greiða tær frá, at teir ikki hava borið boðini um brævið, sum nú er vorðið samrøðuevnið hjá øllum borgarunum í bygdini, tí ongin vil siga, hvat stendur í, meðan Brandur Sandoy, sum var á sama lista sum borgarstjórin, hevur ongantíð verið á fáa orð á.

### Hinir eiga bóltin

Páll á Reynatúgvu er hinvegin sannførdur um, at tað mugu vera teir, sum hava sent brævið, ið koma fram við teirra argumentum fyri at fáa borgarstjóran at leggja frá sær.

- Tað má vera fyrsta treyt, at áloypararnir koma við sínum, áðrenn hin parturin verjir seg, sigur Páll á Reynatúgvu, og staðfestir, at hinir bara skulu spæla bóltin.

Tó kann Páll á Reynatúgvu anda lætt, tí tað ber sambært kommunustýrislógini ikki til at koyra ein borgarstjóra frá, eftir hann er valdur. Um hann ikki ger nakað ólógligt, væl at merkja.

Tí er tað bara Páll á Reynatúgvu, sum avger, um hann fer frá ella ikki.

Á sama hátt sum Brandur Sandoy, hevur Páll á Reynatúgvu heldur ikki verið beinleiðis lættur at fáa orð á. Ikki fyrr enn hann varð funnin í túninum hjá sær vildi hann tosa um málið.

Borgarstjórin sigur seg heldur ikki hava borið upplýsingar um brævið víðari.

### Brævið

Sosialurin hevur enn ikki fingið sjálvt brævið, sum er sent borgarstjóranum, men innlit er umbiðið. Tó bendir alt á, at brævið ikki hevur nakra ávísa grundgeving. Sum skilst verður orðið samstarvstrupulleikar nýtt, og hetta vil hvørgin av pørtunum avsanna.

Somuleiðis eru báðir partar samdir um, at tað ikki stendur so nógv í brævinum, og fleiri ferðir lata partarnir upp fyri møguleikanum, at onki konkret mál verður umrøtt. Samstundis sigur borgarstjórin, at brævið er rættiliga fáorðað, hóast hann ikki vil tosa um, hvat